# Ayr skal nú hitta Glasgow Rangers

*Steypaævintýrið hjá føroyska felagnum í Skotlandi heldur fram, og leygardagin vunnu teir 2-0 á Partick Thistle í fjórðingsfinaluni. Hálvfinalan skal leikast 8. ella 9. mars, og tá verður mætasta lið í Skotlandi hinumegin miðlinjuna*



*Meðan Jens Kristian skjótt vendir heim til B36, skulu liðfelagarnir úr Ayr skjótt royna seg móti Glasgow Rangers*

JÁKUP MØRK

Sum kunnugt hevur tað ikki gingist serliga væl hjá Ayr United í skotsku fyrstudeild, har teir í løtuni er á einum sjeynda plássi.

Í steypakappingini hevur hinvegin gingist teimum munandi betri, og leygardagi tóku teir enn eitt stórt stig á leiðini, tá teir á heimavølli leiktu fjórðingsfinalu móti Partick Thistle, sum somuleiðis spælir í næstbestu deildini.

**Bert ein eftir**

Uttan Jens Martin, sum fríggjadagin fór heim til Føroya, men við Jens Kristiani Hansen á vøllinum í samfullar 90 minuttir, eydnaðist tað Ayr at vinna dystin 2-0, og harvið tryggja sær atgongd til hálvfinalurnar fyri fyrstu ferð í samfull 27 ár.

At hetta er ein stórhending fyri lítla skotska felagið er einki at siga til, og hendingin gjørdist ikki minni, tá lutakastið til hálvfinalurnar var sunnudagin.

Tað lagaði seg nevnliga soleiðis, at Aey United skal leika móti stórfelagnum, Glasgow Rangers, sum í løtuni er klárt á odda í bestu deildini.

Dysturin skal leikast á skotska tjóðarvøllinum, Hampden Park, so einki er at ivast í, at leikararnir fáa eina stóra uppliving, hóast ítróttarligu útlitini ikki eru av teimum bestu.

**Uttan føroyingar**

Tá hálvfinalan verður leikt, verður tað uttan føroyska hjálp, tí til ta tíð er leigumálið hjá føroyingunum runnið út.

Sum nevnt omanfyri, so er Jens Martin longa farin úr Skotlandi, og seinast í hesum mánaðinum stingur Jens Kristian Hansen eisini í sekkin.

Tá vit í gjár prátaðu við Jens Kristian greiddi hann frá, at hann sjálvandi var eitt sindur harmur um, at hann ikki fær hesa upplivingina við, men tað má bara vera soleiðis, heldur hann fyri.

Hann var tó sera fegin um, at hann nú hevði verið við til at tryggjað hálvfinaluplássið, ið, sum omanfyrinevnt, er tað fyrsta síðani 1973 hjá Ayr United.

Karmarnir undan dystinum vóru eisini sera góðir, tí leikvøllurin hjá Ayr var fyltur á tremur, nú søguliga hálvfinaluplássið stóð fyri framman.

**Nýklæktur pápi**

Tað var annars mótstøðuliðið, sum fekk ta betru byrjanina upp á dystin, og Jens Kristian greiður frá, at teir í stórum pørtum av fyrra hálvleiki vóru undir hørðum trýsti.

Verjan megnaði tó at standa seg, og miðskeiðis í fyrra hálvleiki eydnaðist tað enntá at leggja seg á odda. Hetta hendi tá verjuleikari hjá Partick skuldi sparka bóltin burtur. Hann rakti eisini bóltin, men skotið fór á bringuna hjá Neil Duffy, haðani hann støkk aftur í málið.

Ein stór løta fyri Ayr, og ikki minst hjá Duffy, sum vallað hevði sovið tær báðar seinastu næturnar. Kona hansara hevur nevnliga átt sjey vikur ov tíðliga, og tí-skil hevur leikarin helst hugsað meira um heilsuna hjá nýføddа barninum, heldur enn at fyrireikað seg til dystin.

Í seinna hálvleiki legði Ayr nógv bragdligari fyri, og eftir einans fimm minuttum, kundi Neil Tarrant økja um leiðsluna til 2-0, sum eisini gjørdist endaliga úrslitið.

Í skotsku fjølmiðlunum verður nógv skrivað um Tarrant, sum hevur staðið seg avbera væl, síðani hann í heyst varð læntur frá Aston Villa, sum hann hevur sáttmála við.

Hann varð eisini kosin til »man of the match« leygardagin, og nú verður eisini roknað við, at hann verður við í hópinum hjá skotska U-21 hópinum, tá hesin í næstum verður almannakunngjørdur.

Sjálvur helt Jens Kristian tó, at tað heldur átti at verið Duffy, sum fekk henda heiðurin. Ikki bara hevði hann havt ótrúliga ringar umstøður at fyrireika seg til dystin, men hann leikti eisini ein branddyst, umframt at hann var atvoldin til fyrra málið hjá Ayr.

Hvussu er og ikki, so er nú líkt til, at Ayr, uttan føroyingar, fer at spæla fyri fullum húsum, tá teir í hálvfinaluni skulu hitta mætasta liðið í skotskum fótbólti.

## Støðan, skotska 1. deild

| | | dystir | v | j | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Mirren | 27 | 17 | 6 | 5 | 64 | 32 | 32 | 57 |
| 2 | Dunf. | 28 | 15 | 10 | 3 | 50 | 26 | 24 | 55 |
| 3 | Falkirk | 28 | 16 | 5 | 7 | 49 | 33 | 16 | 53 |
| 4 | Raith | 28 | 13 | 7 | 8 | 47 | 33 | 14 | 46 |
| 5 | L.ston | 26 | 13 | 7 | 6 | 43 | 29 | 14 | 46 |
| 6 | Invern. | 28 | 10 | 8 | 10 | 44 | 42 | 2 | 38 |
| 7 | Ayr | 28 | 8 | 6 | 14 | 30 | 39 | -9 | 30 |
| 8 | Morton | 27 | 7 | 6 | 14 | 38 | 49 | -11 | 27 |
| 9 | Airdrie | 27 | 5 | 7 | 15 | 19 | 51 | -32 | 22 |
| 10 | Clydeb. | 28 | 1 | 4 | 23 | 16 | 66 | -50 | 7 |

# Máltindurin

## 1. deild kvinnur

| | | | |
|---|---|---|---|
| Ioana Rápa | VÍF | 156 | (46) |
| Regina Rádó | VB | 137 | (38) |
| Lotte Sørensen | Kyndil | 130 | (54) |
| Vesna Tomajek | Stjørnan | 130 | (54) |
| Jacklin Durhuus | VÍF | 89 | (7) |
| Sunrid Gleðisheygg | Tjaldur | 89 | (24) |
| Inga F. Danberg | Neistin | 88 | (21) |
| Arnleyð Krosslá | VB | 84 | |
| Simona Hansen | Stjørnan | 82 | (8) |
| Andrijana Milodanovic | Stjørnan | 80 | (2) |
| Gurið Mortensen | VB | 78 | (3) |
| Katrin á Neystabø | Neistin | 77 | (25) |
| Ann Hansen | Kyndil | 74 | (12) |
| Annika Ljósstein | Stjørnan | 69 | (16) |
| Jórun Ludvig | Kyndil | 65 | (1) |



*Artur Johansen gjørdi eitt gott hál um vikuskiftið, tá strandingar vitjaðu H71*

## 1. deild menn

| | | | |
|---|---|---|---|
| Sámal Joensen | VÍF | 165 | (30) |
| Heini Joensen | Neistin | 162 | (33) |
| Áki Olsen | Neistin | 155 | (23) |
| Artur Johansen | StÍF | 144 | (33) |
| John Petersen | StÍF | 143 | (42) |
| Ingi Olsen | VÍF | 124 | (12) |
| Jakob Jónsson | Kyndil | 118 | (14) |
| Petur Martin Johansen | KÍF | 114 | (39) |
| Sverri Justinussen | Tjaldur | 113 | (24) |
| Bjarni Wardum | Kyndil | 106 | (24) |
| Halgir D. Olesen | H71 | 101 | (7) |
| Petur Martin Poulsen | KÍF | 91 | (8) |
| Vagnur Johannesen | KÍF | 86 | |
| Suni F. Johannesen | Tjaldur | 84 | (20) |
| Kári Mortensen | Neistin | 82 | |

## Støðan 1. deild kvinnur

| | | dystir | v | j | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Stjørnan | 8 | 7 | 0 | 1 | 512 | 404 | 108 | 23 |
| 2 | Neistin | 8 | 6 | 0 | 2 | 384 | 378 | 6 | 17 |
| 3 | VÍF | 7 | 4 | 1 | 2 | 419 | 377 | 42 | 16 |
| 4 | Kyndil | 8 | 3 | 1 | 4 | 419 | 380 | 39 | 14 |
| 5 | VB | 8 | 2 | 0 | 6 | 458 | 467 | -9 | 8 |
| 6 | Tjaldur | 7 | 0 | 0 | 7 | 300 | 486 | -186 | 0 |

**Stíf hevur tikið liðið úr kappingini**

## Støðan 1. deild menn

| | | dystir | v | j | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 10 | 8 | 0 | 2 | 638 | 498 | 140 | 27 |
| 2 | Neistin | 9 | 9 | 0 | 0 | 621 | 520 | 101 | 27 |
| 3 | StÍF | 9 | 7 | 0 | 2 | 618 | 518 | 100 | 25 |
| 4 | Kyndil | 9 | 5 | 0 | 4 | 588 | 517 | 71 | 17 |
| 5 | KÍF | 10 | 3 | 0 | 7 | 492 | 629 | -137 | 7 |
| 6 | H71 | 10 | 1 | 0 | 9 | 512 | 633 | -121 | 4 |
| 7 | Tjaldur | 9 | 0 | 0 | 9 | 504 | 658 | -154 | 3 |



Tíðindi frá Amnesty International:

# Kina: Tilvildarliga fongslingin av Rebiya Kadeer

*- verji av mannarættindum hjá kvinnuni og samvitskufangi*



Rebiya Kadeer er ein vælkend handilskvinna frá sjálvstýrandi landspartinum Xin-jiang Uighur (XUAR) í Kina, og móður at 10 børnum. Í 1995 var hon limur í almennu nevndini hjá Kina í fjórðu heimsráðstevnuni fyri kvinnur, ið varð hildin í Beijing. Ein kvinna sum bæði kinesisku kvinnurnar og kvinnur úr øllum heiminum løgdu merki til á ráðstevnuni.

Sum fyrrverandi limur av politisku ráðgevandi ráðstevnuni hjá fólksins Kina[1] og sum mest framstandandi kvinnan í etniska uighurminnilutanum í Kina, hevur Rebiya Kadeer gjørt eitt týðandi arbeiði fyri kvinnurættindunum í landinum. M. a. skipaði hon í 1997 rørsluna "The Thousands Mothers Movement", sum møguliga var tað týdningarmiklasta stigið í Kina, síðani Heimsráðstevnan fyri kvinnur hjá ST um at fremja rættin hjá og at útvega arbeiði til kvinnuliga etniskar minnilutar fór fram í 1995. Hetta tiltak var serliga umráðandi í einum landsparti sum XUAR, sum var minst menti landsparturin í Kina.

Í 1997 var rætturin at ferðast frítt tilvildarliga frátikin Rebiyu Kadeer, tá stjórnin tók passið frá henni. Hon kom harafturat útfyri ágangi frá løgregluni, sum førdu størri avmarkingar við sær. Hesi tiltøk frá stjórnini vóru eyðsýniliga ætlaði at leggja trýst á mann hennara - ein fyrrverandi politiskur fangi, sum livdi uttanlanda - fyri at steðga honum at skriva atfinningasamar almennar frágreiðingar um, hvussu Kina fór við uighurunum - muslimski minnilutin í landspartinum. Rebiya Kadeer varð soleiðis at meta sum ein "gíðsli", og noktað útferðarloyvi at vitja mann sín og børnini. Handilsvirkið hennara leyð eisini av revsingunum, myndugleikarnar góvu henni.

11. august 1999 varð hon handtikin í Urumqi, høvuðsstaðnum í XUAR, tá hon varð á veg at hitta ein bólk av amerikonskum vitjandi úr ráðstevnukanningarnevndini hjá USA. Hon hevur síðani sitið í varðhaldi í Liudaowan fongslinum, sum er tiltikið fyri pínslu og vánaliga viðferð av fangum. Í september 1999 varð hon endaliga ákærd fyri "at leka loyniligar upplýsingar til fremmand". Hildið verður, at ákæran hevur samband við ætlaða fundin hjá bólkinum úr ráðstevnukanningarnevndini. Tað er ikki kent, at Rebiya Kadeer hevði nakra atgongd til upplýsingar, sum løgliga kunnu kallast "statsloyndarmál". Heldur ikki hevur hon luttikið í nøkrum andstøðupolitiskum tiltøkum. Nú verður sagt frá, at Rebiya Kadeer líðir undir vánaligari heilsu í varðhaldinum.

Ein sonur Rebiyu, Ablikim Abdiriyim, og skrivari hennara, Kahriman Abdukirim, vórðu eisini handtiknir sum somu tíð sum hon. Eisini teir eru ákærdir fyri "at leka loyniligar upplýsingar til fremmand" ella "fólk uttan fyri landamarkið". 20. november 1999 varð Ablikim Abdiriyim settur í tvey ára "endurútbúgving við arbeiði" (ein fyrisitingarlig revsing, sum verður ásett av eini stjórnarligari nevnd uttan ákæru ella rættargongd), og Kahriman Abdukirim fekk trý ára "endurútbúgving við arbeiði". Sagt verður frá, at báðir hava verið illa viðfarnir í varðhaldinum.

Tíðliga í desember 1999 viðgjørdi ein rættur í Urumqi ákæruna móti Rebiya Kadeer, men noktaði at sakin kundi roynast í rættinum og sendi hana aftur til ákæruvaldið. At senda sakina aftur til ákæruvaldið er ein mannagongd, ið ofta verður nýtt í Kina, tá skuldarspurningurin ikki er nóg greiður, ella illgrunin ov lítil at tryggja dómfelling, serliga í politiskum føri. Henda mannagongd merkir tó ikki, at rætturin ógildar sakina. Hetta merkir, at ákæruvaldið skal endurskoða sakina. Í sakum, ið hildnar verða týdningarmiklar, verður henda mannagongd eisini nýtt sum ein undanførsla at loyva ráðføring við viðkomandi politiskar myndugleikar. Sambært óalmennum keldum, er sakin hjá Rebiyu Kadeer send til myndugleikarnar í Beijing til avgerðar. Hetta tykist at vísa, at prógvini móti Rebiyu Kadeer ikki eru nóg greið at skuldseta hana, og at hennara søk verður hildin at hava ov stóran týdning at verða avgjørd av landsparta myndugleikum.

Rebiya Kadeer er samvitskufangi.

Hvat kanst tú gera?

Skrivað til kinesisku myndugleikarnar, og minn teir á málið við Rebiya Kadeer, bið myndugleikarnar lata bæði hana, son hennara Ablikim Abdiriyim, og skrivara hennara Kahriman Abdukirim leys beinanvegin, ti tey eru samvitskufangar. Skrivað til hesar adressur (Tað ber væl til at skriva longri enn víst í døminum):

1Politiska ráðgevandi ráðstevnan hjá fólksins Kina (CPPCC) varð skipað, áðrenn fólksins lýðveldi Kina varð stovnsett. Teir 4.000 liminir "umboða" bólkar av uttanlanda kinverjum, vísindafólki, trúðarbólkum o.s.fr. Har eru landsparta- og bygdabólkar av CPPCC. Vanliga hittast bólkarnir eina ferð um árið um somu tíð sum fólksins tjóðarráðstevna (tingið), og er ein staður at koma við sínum meiningum og (spakførum) atfinningum at flokkinum. CPPCC hevur onki formligt vald.

President of the People's Republic of China
JIANG Zemin Guojia Zhuxi
Beijingshi
People's Republic of China

Byrjað brævið við: Your Excellency

Chairman of the Xinjiang Uighur Autonomous Regional People's Government
ABDULAHAT Abdurixit Zhuxi
Xinjiang Weiwuer Zizhiqu Renmin Zhengfu
2 Zhongshanlu
Wulumuqishi 830041
Xinjiang Weiwuer Zizhiqu
People's Republic of China

Byrjað brævið við: Dear Chairman

Chief Procurator of the Xinjiang Uighur Autonomous Regional People's Procuratorate
MAIMAITI Yusufu Jianchazhang
Xinjiang Weiwuer Zizhiqu Renmin Jianchayuan
Wulumuqishi
Xinjiang Weiwuer Zizhiqu
People's Republic of China

Byrjað brævið við: Dear Sir

Brævadømi:

In the Faroe Islands we have recently heard reports of minors being held in prisons in the Peopleís Republic of China.

Rebiya Kadeer is a prisoner of conscience detained arbitrarily solely for the peaceful exercise of fundamental human rights and her association with her husband. The charges brought against her are believed to be entirely unfounded and politically motivated.

For political reasons, the government has banned the îThousands Mothers Movementî initiative, and then proceeded to impose restrictions on and the arrest Rebiya Kadeer.

I therefore kindly ask you, mr. chairman Abdulahat, to immediately and unconditionally release Rebiya Kadeer, as well as her son, Ablikim Abdiriyim, and her secretary, Kahriman Abdukirim. Amnesty International considers all three to be prisoners of conscience.

Please ensure that Rebiya Kadeer, Ablikim Abdiriyim and Kahriman Abdukirim, while in custody, are being treated in accordance with international standards for the treatment of prisoners; that the will not be ill-treated and will receive all necessary medical care to ensure they remain in good health while detained.

Yours sincerely

# Viðmerkingar Miðfloksins til upprit landsstýrisins

Upprit Landsstýrisins til samráðingar við danir um framtíðarstøðu Føroya hevur verið í uttanlandanevndini, har umboð Miðfloksins hevur verið við til viðgerðina.

Undir 1. viðgerð á Løgtingi av hesum fyri føroya fólk so týdningarmikla máli vísti løgtingsumboð Miðfloksins á nakrar veikleikar, sum gjørdu, at Miðflokkurin ikki uttan víðari tók undir við ætlanum landsstýrisins. Høvuðssjónarmið floksins var og er framvegis, at **trygdin hjá tí einstaka føroyinginum má setast framum,** eisini evt. fastlæstar floksideologiir. Gjørt varð vart við, at okkum líkaði ikki at landsstýrið fór til samráðingar við danir og kom aftur við endaligum uppskoti, uttan at Løgtingið og føroya fólk fyrst høvdu havt høvi at síggja og viðgera úrslitini av teimum kanningum, sum gjørdar vóru. Her hugsaðu vit m.a. um framrokningar av fíggjarlógum fyri komandi ár, fyri harvið at fáa hóming av, hvussu livikorini hjá tí einstaka føroyinginum kundu hugsast at verða eftir møguliga stovnan av fullveldi.

Hetta førdi flokkurin fram tá, síðani var samband við landsstýrið um júst hetta og aðrar veikleikar í uppskoti landsstýrisins – og varð tað, vit førdu fram, tikið til eftirtektar.

Soleiðis tryggjaðu vit føroyingum, at:

1. orðaskifti varð á løgtingi eftir at allar kanningar vórðu gjørdar, og áðrenn farið varð undir samráðingar við danir
2. uttanlandanevndin varð og verður neyvt kunnað og eftirspurd undir samráðingunum
3. allir flokkar eru umboðaðir í teirri grundlógarnevnd, ið sett varð
4. fólkaatkvøðurnar, ið verða, verða bindandi – og ikki bert vegleiðandi fyri landsstýrið.

Alt hetta ynsktu vit, fyri at forða fyri, at nakað varð smoygt niður yvir føroyingin í óðum verkum – veljarin skal neyvt vita fylgjurnar av tí, hann atkvøður um.

Her valdu vit sostatt eina aðra leið enn hinir báðir andstøðuflokkarnir, sum í staðin fyri at gera eina roynd at fáa ávirkan á uppskot landsstýrisins, valdu at grava skotgravir og seta seg sjálvar uttanfyri ávirkan.

Føroysku veljararnir valdu teir flokkar, ið nú mynda landsstýrið, í einum lutfalli, ið gjørdi teir førar fyri at finna saman um leiðslu landsins og førda politikkin. Ósamdir ella ikki, mega vit virða **demokratiska rætt teirra** at kunna føra samráðingar um broytingar í framtíðar ríkisrættarligu støðu landsins. Uppgávan hjá andstøðupolitikkarum er m.a. at fylgja við arbeiði teirra, royna at bøta um hetta við samráðingum og fremjan av egnum uppskotum, heldur enn fyrilitarleyst at arbeiða ímóti.

Miðflokkurin undrast á og skilir ikki, at landsstýrið í uppleggi sínum ikki viðgerð hernaðarligu viðurskiftini, sumvit vórðu tengd at, tá NATO støðir vórðu lagdar á føroyskt øki. Tær frágreiðingar vit hava fingið í uttanlandanevndini um hví hetta týdningarmikla økið ikki er við í uppritinum, hava als ikki verið nøktandi.

Nógv bendir á, at hetta skuldast ósemju innanhýsis millum landsstýrisflokkarnar, og er hetta ein veikleiki, sum kann koma okkum aftur um brekku. Miðflokkurin heitir á landsstýrið um at fáa greiði á hesum øki, og væntar at ítøkiligar ætlanir verða í tí sáttmálauppskoti, sum landsstýrið leggur fyri uttanlandanevndina, áðrenn farið verður til samráðingar.

Okkum til stúran tykist landsstýrið at taka undir við tilráðingum embætismanna um eina kós, sum uttan iva slóðar leiðir teira, sum treytaleyst ynskja Føroyar sum komandi E.S. limaland. Hetta, frammanundan at siga ja til evruna sum gjaldoyra, fær ikki stuðul og viðmæli Miðfloksins.

Í uppleggi sínum miðar landsstýrið eftir, við avtalum við danir, at varðveita núverandi støðið á vælferðarsamfelagnum. Vit loyva okkum at minna á, at ein trygd, grundað á hjálp menniskja, altíð verður svikalig. Harnæst harmast tað okkum at staðfesta, at førdi politikkurin seinastu tíðina als ikki sannførir um, at tað er trygdin og trivnaðurin hjá **øllum** føroyingum, ið liggur monnum fremst í huga. Hugsan floksins er, at ein djúpsgangandi hugburðsbroyting krevst hjá samráðandi landsstýrismonnum, um hesir skulu vera førir fyri at umseta føgru orðini í uppritinum – um trygd, trivna og vælferð – til veruleika fyri borgaran.

**Jenis av Rana,
umboð Miðfloksins
í uttanlandsnevndini**